ÍF-EB/Streymur:

# Týdningarmikil javnleikur

**ÍF fekk eitt stig úr dystinum móti EB/Streymi, og tó at B68 vann, so bøtti stigið munandi um støðuna hjá fuglfirðingum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Tað var einki at fara skeivur í, at fuglfirðingar høvdu sett nøsina upp eftir trimum stigum, tá teir sunnudagin fingu vitjan av EB/Streymi. Ein sigur her vildi – saman við B68 tapi – viðført, at ÍF ekkaleyst kundi fara á Svangaskarð um eina viku.

Tað kunnu teir ikki heilt, tí toftamenn vunnu óvæntað sín dyst, umframt at ÍF ikki vann, men stigið hjá ÍF kann tó vísa seg at hava stóran týdning. Í øllum førum gjørdi tað nú, at B68 skal vinna í minsta lagi tvær ferðir afturat, fyri at teir skulu bjarga sær upp um ÍF, sum annars hevur fyrrverandi B68-venjaran við stýrisvølin nú.

## Heimatrýst

ÍF legði fyri sum eitt óløgi sunnudagin. Alt fyri eitt sást, at heimaliðið hevði nakað nógv meira bit í tacklingum og nærdystum annars, og tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn teir høvdu lagt seg á odda. Fríspark varð dømt nakað uttan fyri brotsteigin, og Høgni Zachariasen høgdi til móti samankomingini, uttan at Gunnar á Steig í EB/Streyma málinum hevði nakran sum helst møguleika at bjarga.



*Tað eydnaðist ÍF at fáa eitt stig úr heimadystinum móti EB/Streymi, men einki er at ivast í, at teir høvdu ætlað sær sigurin*
*Mynd: Jonhard Hammer*

Og eftir hetta tóktust teir á heimaliðnum at hava fult tamarhald á dysitnum. EB/Streymur var kanska ikki heilt vandaleyst, tá teir kontraðu, og ta einu ferðina átti Sorin helst at havt skorað, men tað var ÍF, sum átti trýstið hesi fyrstu trý korterini.

Eftir steðgin komu gestirnir tó betri við. Teir megnaðu í ávísan mun at trýsta vertirnar, sum nú kanska eisini hugsaðu meira um verjupartin, men tað skuldi eitt mál av teimum heldur kontroversiellu til, áðrenn útjavningin fall.

Fuglfirðingar hildu í øllum førum, at EB/Streymur skuldi geva teimum bóltin eftir innkast, men gestirnir vóru tó ikki samdir í hesum. Innkastið varð tikið skjótt, og tá Fróði Clementsen sendi inn um ÍF-verjuna, var Sonni L. Petersen skjótur at toga seg enn eitt fet upp eftir máltindinum, har hann nú bert er eitt mál frá Rógva Jacobsen.

## Gestirnir best nøgdir

Gestirnir tóktust vera nøgdir um, at talan ikki varð um tap, og í øllum førum var tað ÍF, sum trýsti meira seinastu løtuna. Teir vóru eisini nær við einar tvær ferðirnar, men meira enn næstan gjørdist tað ikki.

Sum heild eru tað helst eisini gestirnir, sum kunnu vera betri nøgdir um úrslitið. Tað bar við sær, at EB/Streymur framvegis hevur fatur í breiða miðjufeltinum, og tó at talan helst ikki verður um heiðursmerki, so tykist tað aftur í ár at vera framgongd í mun til seinasta kappingarár, og kunnu teir í felagnum áhaldandi halda fast um hesa framgongd, er nokk ikki so nógv at fýlast á.

Hjá ÍF høvdu trý stig verið ógvuliga kærkomin. Ikki minst nú B68 eisini vann, men enn halda fuglfirðingar seg so á plássinum, sum gevur rætt til at spæla um plássið til komandi kappingarár.

Um tað so eisini skal eydnast teimum at halda fast um plássið, er ein onnur søga. Fyrsti partur av henni verður skrivaður um eina viku, tá ÍF vitjar á Svangaskarði, har B68 ikki hevur ráð at hugsa um nakað annað enn trý stig.

## FAKTA UM DYSTIN

**ÍF-EB/Streymur 1-1 (1-0)**
13.: 1-0 Høgni Zachariassen
63.: 1-1 Sonni L. Petersen

ÍF: Kartin Joensen – Áki Petersen, Viggo Johannesen, Bartal Eliasen, Rúni Elttør – Hanus Eliasen, Høgni Zachariassen, Eyðolvur Petersen – Gunnar Nielsen (46.: Eyðun Ryggshamar), Sylla D. Amed (72.: Teitur Joensen) – Magni á Lakjuni.
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Gert Hansen, Fróði Clementsen, Andrzej Pacek, Esmar Eiðisgarð – Bárður Olsen, Knút Vesturtún (46.: Jákup M. Joensen), Marni Djurhuus, (75.: Hallur Jacobsen), Hans Pauli Samuelsen – Sorin Angel, Sonni L. Petersen.
Gult kort: Viggo Johannesen, Sylla D. Amed – Esmar Eiðisgarð.
Dómari: Birgir Sondum

WWW.SMYRIL-LINE.COM
Bingo!!!
...ja, nú verður aftur ein Rimmar Bingotúrur við NORRÖNU
– hesaferð á Danmarkarferðini 23.-27. September
Bingotúrur við spenningi og fjølbroyttum mati, ÓTRÚLIGA góðum vinningum, góðum innkeypsmøguleikum í hugnaligum umhvørvi.
Vinningar:
✓ Pakkaferð til Danland
✓ Ferðir við Norrönu
✓ Flogferðir við Atlantic Airways
✓ Vikuskifti á Hotel Føroyum
✓ Døgurðar á Hotel Føroyum
✓ Luktilsi
...og mangt annað
PRÍSIR
4 koyggjukamar v. wc/bað innv. ..... 600,-
4 koyggjukamar v. wc/bað útv. ....... 700,-
3 koyggjukamar v. wc/bað innv. ...... 800,-
3 koyggjukamar v. wc/bað útv. ....... 900,-
2 koyggjukamar v. wc/bað útv. .... 1.000,-
Prísurin fatar um ferð fram og aftur á farleiðini Tórshavn-Hanstholm (matur og drykkjuvørur ikki íroknað).
Prísur fyri hvønn úr kr. 600,-
SMYRIL LINE
J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo



KISSA 40 ÁR
Í SAMBANDI VIÐ AT VIT FYLLA 40 ÁR TÝSDAGIN 14. SEPTEMBER 2004
lata vit 40% í avsláttri av nógvum vørum alla vikuna
Byrjað verður týsdagin
Tá bjóða vit kaffi og køkur




P/F hjá KISSA
TÓRSGØTA · 100 TÓRSHAVN · TEL 31 13 95
Sosialurin 341800